**Nr. 72/2014**

**Bjarni Djurholm**
**løgtingsmaður**

**Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a**

**Fyrispurningur um at verkafólk missa 1100 kr. um mánaðin orsakað av politikki samgongunnar, settur Jørgen Niclasen, landsstýrismanni (at svara skrivliga eftir TS § 52a)**

1. Hvørja ávirkan á pensjónina hevur forskatting av inngjaldinum í mun til, um pensjónin verður skattað við útgjaldi?
2. Hvussu verða løntakarar skattaðir í prosentum í sambandi við forskattingina og í mun til skatting við útgjaldi?
3. Hvussu stóra upphædd hevur vanligur verkamaður at ráða yvir við pensjónsaldur við forskattaskipanini í mun til gomlu skipanina?
4. Er minni peningur í umfari í samfelagnum nú í mun til, um forskattingin ikki varð framd?
5. Eru livikorini versnað hjá verkafólkum orsakað av forskattingini og flatskatta-skipanini?
6. Áðrenn forskattingina var kapitalpensjón skattað við 35%, nú verður øll pensjón skattað við 40% - hvørja støðu hevur landsstýrismaðurin til hesa skattahækking?

**Viðmerkingar**:
Fyri stuttum vistu miðlarnir at siga frá fundi í Føroya Arbeiðarafelag, at orsakað av flatskattaskipanini, og at pensjónirnar verða skattaðar við inngjaldi, eru nýggju skipanirnar ein vanlukka fyri verkafólk við lágari og miðalgóðari inntøku.

FA hevði fingið uttanhýsis fíggjarráðgeva at rokna út, hvørja ávirkan flatskatta-skipanin og forskattingin av pensjónunum hevur á nettoúrtøkuna hjá verkafólkum í mun til "gomlu" skattaskipanirnar (áðrenn flatskatt og forskattingina).

Niðurstøðurnar vóru í síni heild eyðsýnt vánaligar fyri verkafólk. Serliga var skipanin við forskattingini umrødd sum rán frá verkafólki.

Dømi var lýst, har verkafólk í 5 ár hevði spart saman eftir gomlu skipanini og síðani 35 ár eftir nýggju skipanini, har pensjónin verður forskattað. Úrslitið var, at verka-fólkið fær 134.000 kr. árliga í eftirløn. Var forskatting av pensjónini hinvegin ikki framd, hevði sama verkafólk fingið 147.000 kr. árliga.

Úrslitið verður sostatt 13.000 kr. minni um árið í pensjón orsakað av forskattingini av pensjónunum.

Samanumtikið var niðurstøðan, at eftir gomlu skipanini hevði pensjónisturin goldið 30% í skatti, men eftir nýggju skipanini er skatturin 40%.

Víst varð eisini á, at forskattingin av pensjónunum kostar limunum hjá FA 30 mió. kr. um árið. Peningur, sum eisini er minni í umfari í samfelagnum.

Niðurstøðan var, at við lógarkravdu pensjónsuppsparingini og harða skattatrýstinum er talan um revolvarapolitikk móti verkafólkum.

Samanumtikið eru livikorini hjá vanligum løntakarum gjørd nógv verri orsakað av førda skattapolitikkinum.

Hetta eru serstakliga álvarsligar ábreiðslur, men samstundis sera viðkomandi, sum eiga at verða lýstar í smálutir.

Tí verða spurningarnir omanfyri settir landsstýrismanninum at svara. Biðið verður um, at umframt skrivligu svarini, at dømi eisini verða lýst í tabellum.

**Á Løgtingi, 26. mars 2015**

Bjarni Djurholm